# Kyndil setti met

*Hondbóltur: Kyndil vann við heili 24 málum á Tjaldur, tá liðini bæði hittust í Runavíkini, og hetta er størsti sigurin í bestu mansdeildini hetta kappingarárið*

JÁKUP MØRK



*Hóast tað ikki verða nøkur heiðursmerki í landskappingini til mansliðið hjá Kyndli hetta kappingarárið, so hava teir fingið nakrar trivaligar sigrar kortini*

Ikki kann sigast, at nakar spenningur var um úrslitið, tá besta mansliðið hjá Kyndli sunnudagin var í Runavík á vitjan.

Heldur var talan um gera dystin burtur av sær, tí satt at siga, so hevði kyndilsliðið einki at spæla fyri, nú allar vónir um heiðursmerki hetta kappingarárið eru farnar fyri skeyti.

**Metsigur**

At dysturin so kortini endaði við einum metsigri komst í stóran mun av, at tað var eitt tjaldurslið, sum var sera hart rakt av avboðum, sum kom á vøllin sunnudagin.

Í mun til dystin moti StÍF fyri góðari viku síðani var so at siga alt liðið skift út. Tummas Magnussen og Ragnar Hansen fingu reyða kortið í tí dystinum, og vóru tískil leikbannaðir hesu ferð, og leikandi venjarin, Sverri Justinussen var staddur uttanlanda í fullveldisørindum.

Harumframt noyddust bæði Mortan Hansen og Suni Fríði Johannesen at geva avboð til dystin, og tá hópurin ikki er serliga breiður, er hetta nakað sum merkist.

Kyndilsleikararnir kundu sostatt taka sær rættuliga av løttum í dystinum, og so at siga allir leikararnir fingu høvi at vísa síni evni.

**Tjaldur eigur bæði metini**

Runavíkingar hava sostatt ivasama heiðurin av at eiga størsta tapið hjá bæði monnum og kvinnum.

Tá kvinnurnar fyrr í ár vitjaðu í Vestmanna máttu tær leggja rygg til størsta tapið í kvinnudeildini, tá tær taptu 32-9, altso við 23 málum.

Merkisvert er kanska, at hóast talan gjørdist um slíkan stórsigur, so var eingin leikari á kyndilsliðnum, sum gjørdi serliga nógv um seg við málskjótingini, men hetta hevur sum so eisini verið styrkin hjá grøna havnarliðnum hetta kappingarárið, nevnliga at eingin leikari heur altavgerandi týdning fyri liðið.

Hinvegin hevur hetta kanska eisini merkt liðið negativt, við tað at teir ikki hava havt leikaran, sum einsamallur kann avgera ein dyst, ella sum skjýtur eini 8-10 mál í hvørjum dysti.

Slíkar leikarar hava VÍF, Neistin og StÍF, og kanska hevur hetta verið munurin á liðunum hetta kappingarárið.

**Dysturin í tølum:**

Málskjúttar:
Tjaldur: Arnfinn Langgard 3, Bergur Djurhuus 3, Dan Lamhauge 2, Áki Hansen 2, Jónstein Petersen 1
Kyndil: Høgni Klein 7, Rúni Poulsen 6, Uni Wardum 6 (1), Bjarni Wardum 5, Jacob Jónsson 4 (1), Niels Viggo Niclassen 3 (1), Hans Áki Dahl Christiansen 3 (1), Lars Winther 1 (1)
Brotskøst:
Tjaldur 1, Kyndil 6
Útvísingar:
Tjaldur 4
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

## Størstu sigrarnir hetta kappingarárið

| 1. deild kvinnur | 1. deild menn |
|---|---|
| 23. januar 2000: VÍF-Tjaldur 32-9 (23 mál) | 19. mars 2000: Tjaldur-Kyndil 11-35 (24 mál) |
| 12. desember 1999: Tjaldur-VB 17-37 (20 mál) | 17. november 1999: KÍF-StÍF 21-39 (18 mál) |
| 11. mars 2000: Tjaldur-VB 15-34 (19 mál) | 5. januar 2000: VÍF-H71 35-19 (16 mál) |

# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 163 | (47) |
| Regina Rádó | VB | 146 | (42) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 139 | (58) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 133 | (54) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 96 | (7) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 94 | (25) |
| Inga F. Danberg | Neistin | 88 | (21) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 86 | |
| Simona Hansen | Stjørnan | 86 | (8) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 83 | (2) |
| Gurið Mortensen | VB | 82 | (3) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 78 | (17) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 77 | (25) |
| Ann Hansen | Kyndil | 74 | (12) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 72 | (1) |



*Heini Joensen er nú besti málskjútti hjá monnunum, men bert eitt mál skilir tríggjar teir ovastu*

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heini Joensen | Neistin | 166 | (35) |
| Sámal Joensen | VÍF | 165 | (30) |
| Áki Olsen | Neistin | 164 | (23) |
| John Petersen | StÍF | 149 | (46) |
| Artur Johansen | StÍF | 145 | (34) |
| Ingi Olsen | VÍF | 124 | (12) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 122 | (15) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 114 | (39) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 113 | (24) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 111 | (24) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 108 | (7) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 94 | (9) |
| Vagnur Johannesen | KÍF | 91 | 0 |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 84 | (20) |
| Hans Á. D. Christiansen | Kyndil | 83 | (15) |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 545 | 426 | 119 | 25 |
| 2 Neistin | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 384 | 378 | 6 | 17 |
| 3 Kyndil | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 443 | 395 | 48 | 16 |
| 4 VÍF | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 463 | 437 | 26 | 16 |
| 5 VB | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 485 | 489 | -4 | 10 |
| 6 Tjaldur | 8 | 0 | - | 0 | - | 8 | 315 | 510 | -195 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 10 | 10 | - | 0 | - | 0 | 645 | 543 | 102 | 29 |
| 2 VÍF | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 638 | 498 | 140 | 27 |
| 3 StÍF | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 641 | 542 | 99 | 25 |
| 4 Kyndil | 10 | 6 | - | 0 | - | 4 | 623 | 528 | 95 | 19 |
| 5 KÍF | 11 | 3 | - | 0 | - | 8 | 512 | 654 | -142 | 7 |
| 6 H71 | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 537 | 653 | -116 | 6 |
| 7 Tjaldur | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 515 | 693 | -178 | 3 |



Viðmerking:

# 29 kúvendingar og sjálvmótsagnir

Javnaðarflokkurin sigur seg vilja tað sama sum samgongan í sjálvstýrismálum, men allíkavæl hevur flokkurin bert roynt at runnið undan og hevur roynt at forða fyri, at nakað skal henda. Um ikki annað, so kann flokkurin og formaður tess kanska vinna sær sess í Guinnes Book of Records, fyri flestar politiskar kúvendingar og sjálvmótsagnir hjá nøkrum flokki í heiminum innan stytstu tíð.

1. Fyrst tosaðu tey um eina uppgerð við Danmark og eina íslendska loysn fyri valið. So søgdu tey seg taka undir við samgonguskjalinum um ríkisrættarligu broytingarnar. So atkvøddu tey ímóti uppskotinum hjá samgonguni, sum annars var ein íslendsk loysn.

2. So søgdu tey nei til semju, tá landsstýrið bjóðaði til fundar — tey vildu ikki vera atkvøðuneyt. So vildu tey hava breiða semju allíkavæl.

3. So vóru tey ímóti mannagongdini og atkvøddu eisini ímóti grundlógarnevndini. Nú siga tey, at arbeiðið í grundlógarnevndini er sera týdningarmikið og áhugavert.

4. So góvu tey ein faldara út, har tey søgdu seg hava somu mál sum landsstýrið. So vóru tey ímóti málinum allíkavæl.

5. So vóru tey ímóti Hvítubók. So bíðaðu tey bara eftir Hvítubók. So var Hvítabók ikki kvalifiserað og eitt makkverk. So var Hvítabók knappliga gott prógv fyri, at teirra uppskot er tað besta.

6. So var tað ongin trupulleiki at broyta donsku grundlógina. So var tað knappliga ikki neyðugt at broyta grundlógina, tí tað var ov trupult.

7. So var tað neyðugt at fáa serfrøðingar at granska juridisku trupulleikarnar. So var tað knappliga ikki neyðugt at tosa um jura — alt bar til.

8. So læsti flokkurin seg ikki fastan í sovorðið fjas sum fullveldi ella ríkiseind. Tað vóru bert tjóðveldis- og sambandsflokkurin, sum vóru fundamentalistiskir. So var knappliga ríkisfelagsskapurin (sum ongin veit hvat er) tað avgerandi, fundamentala markið fyri javnaðarflokkin — júst sum hjá sambandsflokkinum.

9. Í sínum faldara søgdu tey øllum Føroya fólki, at blokkurin skal minkast burtur. Síðani hava tey sagt, at tað verður neyð og elendigheit, um blokkurin minkar.

10. So kundi teirra uppskot geva føroyingum alt — eisini eitt flagg hjá ST í New York. So kundi teirra uppskot allíkavæl ikki geva tað, og so var flaggstongin slettis ikki neyðug longur.

11. So vildu tey hava, at alt løgtingið var við í arbeiðinum, og at fundir vóru við andstøðuna. So fingu tey sín vilja. Fyrst vóru kaffifundirnir góðir, har tey vóru kunnað um alt og skiltu allar ætlanirnar hjá landsstýrinum. So vistu tey knappliga onki um, hvat landsstýrið vil.

12. So var uttanlandsnevndin ikki góð nokk. So var hon góð nokk allíkavæl.

13. So var tað sera týdningarmikið at kaffifundirnir vóru í trúnaði og onki varð sagt fyri ikki at órógva politisku prosessina. So var tað øgiliga neyðugt, at viðgerðin í uttanlandsnevndini *ikki* var í trúnaði.

14. So søgdu tey, at landsstýrið brúkti ov nógva orku uppá at upplýsa um sínar ætlanir. Tað var propaganda og landsstýrið fór bara eftir málinum. Nú siga tey, at landsstýrið roynir at fjala og dylja málið og ongin veit, hvat landsstýrið vil.

15. So var sambandsflokkurin steinrunnin. Og fólkaflokkurin var størsta hóttanin fyri samfelagið. So eru tey knappliga mest samd við júst hesar flokkar og vildu hava breiða semju við teir — ja, serliga Óli Breckman og Bjarni Djurholm eru nærum einglar, siga javnaðarfólk á tingsins røðarapalli dagliga.

16. Fyrst vóru danska stjórnin og Poul Nyrup Rasmussen svikarar móti Føroya fólki. Nú eru stjórnin og donsku sosialdemokratarnir knappliga trygdin fyri framtíðini og vælferðini hjá føroyingum. Og nú biður formaðurin í javnaðarflokkinum beinleiðis donsku stjórnina um at leggja seg út í føroyska orðaskiftið.

17. So skulu vit hava breiðar semjur í Føroyum. So fer formaður javnaðarfloksins til Danmarkar at fortelja fyri bæði donskum politikarum og útlendskum ambassadørum, at ætlanin hjá landsstýrinum ikki er góð; men eitt mótsigandi javnaðaruppskot er nógv betri fyri framtíð føroyinga.

18. So segði javnaðarflokkurin seg hava eina greiða støðu í ríkisrættarliga málinum. So kundi flokkurin knappliga ikki taka støðu, tí tey vistu ov lítið um málið.

19. So skuldi semjan roynast í uttanlandsnevndini. So hildu tey landsfund, áðrenn málið varð liðugt viðgjørt í nevndini.

20. So skuldu tey skriva álit í uttanlandsnevndini saman við sambandsflokkinum. So skuldu tey ikki allíkavæl skriva álit saman við sambandsflokkinum. So skrivaðu tey allíkavæl álit saman við sambandsflokkinum.

21. So forlangaði formaðurin í javnaðarflokkinum, at Caragata-álitið skuldi til aðalorðaskiftis. So var tað onki vert allíkavæl at hava aðalorðaskiftir.

22. So var tað alneyðugt at taka andstøðuna við og ikki bert gera alt til samgongumál. So rýmdu tey úr tinginum, tí samgongan ikki var samd.

23. So var landsstýrið ódemokratiskt í síni framferð. So hevði landsstýrið knappliga fylgt øllum demokratiskum spælireglum til fulnar.

24. So vóru veljarakanningarnar óalítandi og settu ov fáar og nýggjar spurningar sum ikki kundu samanberast. So vóru tær álítandi allíkavæl. Og so allíkavæl ikki, tí ov nógvir spurningar vórðu settir. Og so allíkavæl álítandi, tá heilt nýggir spurningar vórðu settir, sum ikki kundu samanberast.

25. So var neyðugt at melda avgjørt út: Javnaðarflokkurin setti sítt avgjørda mark við ríkisfelagsskapin. So viðgingu tey, at ongin veit, hvar tað markið var, men at tað skulu tey nokk fortelja, tá samráðingarnar eru lidnar — og tað verður teirra definisjón, sum tey tá finna, ið er avgerandi. Segði nakar, at semja skuldi finnast?

26. Í faldara floksins varð sagt, at evsta vald í Føroyum skuldi liggja hjá Føroya Løgtingi, at Føroyar og Danmark skulu gera ein samveldissáttmála millum tvey sjálvstøðug lond og at ríkisstuðulin skuldi minka burtur. Samgongan segði, at hetta er í fínasta lagi. Nú skal Føroya Løgting bert vera evsta vald í yvirtiknum málsøkjum, Føroyar og Danmark skulu vera í ríkisfelagsskapi millum tvær sjálvstøðugar tjóðir — ikki lond — og ongin ríkisstuðul skal minka. Hvør er nú munurin til sambandsflokkin?

27. Í faldaranum stóð á fyrstu síðu, at ongin er betur førur fyri at taka avgerðir um føroysk viðurskifti, enn føroyingar sjálvir. Síðani heittu tey beinleiðis á danskar politikarar og donsku stjórnina um at taka avgerðina fyri føroyingar — tí tað máttu teir jú hava rætt til.

28. So var Frederik Harhoff eitt sannleiksvitini uppá, at uppskot javnaðarfloksins var í lagi. So segði hann hetta vera møsn — og tá var hann knappliga óálítandi.

29. So var fullveldisætlan samgongunnar merkt av droymaríi og var ikki nóg realistisk — onki av hesum bar til. So bar knappliga alt til við javnaðaruppskotinum — tí vit kundu í felag við Danmark skapa nakað nýtt, sum ongantíð var sætt fyrr, og máttu ikki lata okkum støðga av juridiskum og politiskum forðingum.

Hetta vóru bert nakrar av kúvendingunum, sum eg kom at hugsa um. Ivaleyst eru tær nógv fleiri, og rekordlistin er neyvan liðugur enn. Fólk kunnu sjálvi fylla hann út so hvørt.
Kanska skuldu vit gjørt eina kapping um, hvør finnur flest sjálvmótsagnir og kúvendingar hjá javnaðarflokkinum? Vinnarin kann so fáa tann heiður at gera av, hvørja meining javnaðarflokkurin skal broyta í næstu viku.

**Dia Ellindsson**
**Tjóðveldismaður**
**Runavík**

# Fiskimannafelagið velur ongan lim

*Føroya Fiskimannafelag velur ongan lim í Fiskivinnuráðið fyrr enn felagið hevur fingið innlit, sigur felagið í tíðindaskrivið*

Víst verður til uppskotið, sum Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, hevur lagt fram á ting um fiskivinnuráð, og sum skal koma til 1. viðgerð í dag.

Uppskotið er sum so ikki so galið og kundi væl verið brúkt sum grundarlag fyri samskifti millum landsstýri og vinnu.

Men tað er óneyðugt at siga, at eitt fiskivnnuráð hevur bert týdning, um fiskimálastýrið veruliga hevur áhuga fyri einum slíkum samskifti. Men her eru royndirnar stak vánaligar. Viðferðin sum Føroya Fiskimannafelag hevur fingið frá fiskimálastýrinum bendir ikki á nakran hátt á nakran vilja til samskifti, soleiðis sum tað væl og virðiliga er greitt frá í blaðnum hjá felagnum.

Vit skulu bert taka aftur í aftur, at fiskimálastýrið nú í meira enn 100 dagar í stríð við heilt greiða lógarreglu ikki hevur svarað til okkara umbøn um innlit í málið um yrkisráðið hjá lønjavningargrunninum. Endamálið við hesi umbøn er at fáa greiðu á tí leikluti sum fiskivinnuumsitingin, John Petersen, landsstýrismaður og Annfinn Kallsberg, løgmaður, hava havt í hesum máli go skal hetta so nýtast til at meta um leilutin hjá vinnunevndini og landsstýrismálanevndini í hesum máli.

Umframt hetta er felagið strikað á postlistanum hjá stýrinum, burtursæð frá málum, sum hava samband við sjóvinnuumsitingina. Í málum viðvíkjandi inntøkutrygd fáa vit heilt konsekvent ikki svar uppá nakran fyrispurning, og tað uttan mun til um talan er um prinsipiel mál ella reint praktiskir fyrispurningar. Tað er okkara avgjørda meting, at hetta er ein mannagongd, sum er í samsvar við »signalir« frá løgtinginum tess nevndum.

Tí vilja vit boða tinginum frá, at Føroya Fiskimannafelag fer ikki at seta val av limi í einum nýggjum fiskivinnuráð á dagsskránna fyrr enn felagið hevur fingið eftirlíka sítt lógásetta krav um innlit í sakini um yrkisráðið og felagið hevur fingið møguleika at meta um tann »góða viljan« hjá landsstýrinum út frá tí, sum finst í hesum máli.

## TIPS 12 úrslit
**Vika 11**
**18.–20. mars**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Esbjerg–AGF | 2 |
| 2. | FC København–AB | 2 |
| 3. | Herfølge–Brøndby | 2 |
| 4. | Lyngby FC–Vejle | 2 |
| 5. | OB–Viborg | 2 |
| 6. | B 93–Haderslev | 1 |
| 7. | FC Midtjylland–B 1909 | 1 |
| 8. | Horsens–Fremad Amager | 1 |
| 9. | Randers freja–Køge | X |
| 10. | Svendborg–FC Aarhus | 2 |
| 11. | Ølstykke–Frem | X |
| 12. | Skive–Aalborg Chang | 2 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | 83.495,- kr. |
| 11 rætt: | 6.797,- kr. |
| 10 rætt: | 593,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 13 úrslit
**Vika 11**
**18.–20. mars**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Coventry–Bradford | 1 |
| 2. | Derby–Liverpool | 2 |
| 3. | Leicester–Manchester U. | 2 |
| 4. | Southampton–Aston Villa | 1 |
| 5. | Sunderland–Middlesbrough | X |
| 6. | Watford–Sheffield W. | 1 |
| 7. | West Ham–Chelsea | X |
| 8. | Birmingham–Barnsley | 1 |
| 9. | Fulham–Blackburn | X |
| 10. | Grimsby–Bolton | 2 |
| 11. | Nottingham F.–Tranmere | X |
| 12. | Walsall–Queebs Park R. | 2 |
| 13. | West Bromw.–Huddersfield | 2 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 13 rætt: | 105.740,- kr. |
| 12 rætt: | 1.976,- kr. |
| 11 rætt: | 192,- kr. |
| 10 rætt: | 83,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## LOTTO
**Vika 11 – 18. mars**

Vinnaratøl: **05 - 09 - 18 - 19 - 25 - 27 - 28**
Eykatøl: **07 - 20**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | 1.382.582,- kr. |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | 43.920,- kr. |
| 6 vinnaratøl: | 3.448,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 129,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 32,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 11 – 18. mars**

Jokaratal: **3-9-6-8-4-6-5**

| | |
|---|---|
| 7 rætt: | Eingin vinnari |
| 6 aftastu rætt: | 486.876,- kr. |
| 5 aftastu rætt: | 40.600,- kr. |
| 4 aftastu rætt: | 2.619- kr. |
| 3 aftastu rætt: | 267,- kr. |
| 2 aftastu rætt: | 52,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## DUSINO
**Vika 11 – 19. mars**

Vinnaratøl: **01 - 04 - 07 - 09 - 10 - 12 - 14 - 16 - 17 - 18 - 19 - 21**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | 172.354,- kr. |
| 11 í sama punti: | 3.107,- kr. |
| 10 í sama punti: | 98,- kr. |
| 9 í sama punti: | 24,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum